# Tónabond yvir hav

**Soleiðis nevnist verkætlan hjá Sharon Weiss, har tóna- og vinabond verða knýtt millum ungar føroyskar og hetlendskar tónleikarar. Og endamálið er at vekja áhuga fyri fólkatónleiki, sum livir væl í Hetlandi, men sum fá ung spæla í Føroyum. Men í Hetlandi er fólkatónleikur cool og tað halda spírandi føroysku fólkatónleikararnir eisini**

FÓLKATÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Tónabond yvir hav. Ung úr Hetlandi og úr Føroyum spæla fólkatónleik saman og hóast rót innan rock, punk og klassiskt, so viðganga ungu føroysku tónleikararnir, at tað - eins og í Hetlandi - eisini er cool at spæla fólkatónleik í Føroyum*

(Mynd: D. Olsen)

Fólkatónleikurin hevur tað ikki betri enn næstbest í Føroyum, meðan hann hinvegin blómar í Hetlandi, eisini millum blaðungar tónleikarar. Fólkatónleikurin er cool í Hetlandi og er at meta ájavnt við rocktónleik millum ung.

Í hesi ásannan fór Sharon Weiss, fólkatónleikari, í holt við eina verkætlan, sum hon nevnir Tónabond yvir hav. Endamálið er at styrkja bond millum ungar fólkatónleikarar úr Hetlandi og Føroyum, at menna ungu tónleikararnar, at menna áhugan fyri fólkatónleiki úr Føroyum og Hetlandi og at bera fram mentan úr Føroyum og Hetlandi.

Endamálið var greitt at stovna ein ungan fólkatónleikarabólk við leikarum úr Føroyum og Hetlandi, sum venja sama tilfar, ið hevur uppruna úr Hetlandi, Føroyum og Norðurlondum annars.

## Cool

Og í hesum døgum vitja so ungu fólkatónleikararnir úr Hetlandi sínar viðspælarar í Føroyum. Tey hava sent nótar og fløgur sínamillum, og lærararnir, Sharon Weiss í Føroyum og Bernadette Porter í Hetlandi, hava so staðið fyri at vant við teimum. Millum tilfarið er siðbundið hetlendskt tilfar, tilfar eftir Svabo og Ívar Bærentsen.

Stuttligt er, at bæði føroysku og hetlendsku tannáringarnir hava ymsa bakgrund tónleikaliga. Føroyingarnir hava rót innan punk og rock og klassiskan tónleik, musikkskúlan, meðan nakað tað sama er galdandi fyri tey vitjandi úr Hetlandi, hóast tey hava fólkatónleikin nærri í gerandisdegnum, tí hann har er livandi og partur av gerandislívinum.

Upprunaliga skuldu føroysku leikararnir til Hetlands í vár, men t.d. broyttar ferðaætlanir forðaðu hesum, men nú vitja so hetlendingar í Føroyum. Øll hava tey so vant saman hesar dagarnar og tað gongur væl. Øll fegnast tey um samstarvið, vinabondini og møguleikan at spæla og vitja at hvør annan.

Og føroysku tannáringarnir fegnast eisini um møguleikan at spæla fólkatónleik, og tey smæðast ikki við at viðganga, at eins og tað er cool at spæla fólkatónleik í Hetlandi, so halda tey eisini, at hetta er sera stuttligt og cool.

## Spírar

Í Hetlandi er ein rúgva av blaðungum fólkatónleikarum, meðan tað ikki stendur so væl til í Føroyum.

Sharon Weiss sigur, at t.d. nýtir hon bert livandi tónleik til dansiundirvísing. Men sum heild eru tað tilkomin og bert nøkur fá , ið spæla fólkatónleik, um enn tað eru nøkur einstøk ung við í t.d. Spælimonnunum.

Við hesum tiltakinum, Tónabond yvir hav , vónar hon, at áhugi er kveiktur millum ung fyri fólkatónleki. Og sambært teim ungu føroysku tannáringunum, so er als ikki ógjørligt, at hetta er nakað, ið heldur fram.

Úrslitið av venjingunum sístu dagarnar hevur verið at hoyrt, t.d. í Miðlahúsinum í Vágsbotni, men mikukvøldið spæla ungu fólkatónleikararnir á Loungini á Hafnia, hósdagin úti í Fugloy, sum partur av Fólkatónleikastevnuni, um vikuskiftið eru tey á palli á G! Festivalinum og sunnudagin spæla tey í Norðurlandahúsinum.

# Lesandi - eitt ótroytt tilfeingi

TÍÐINDASKRIV FRÁ MEGINFELAG FØROYSKRA STUDENTA

Undir heitinum "Lesandi - eitt ótroytt tilfeingi" skipar MFS hóskvøldið 21. Juli fyri lestrarstevnu í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Umframt fleiri áhugaverdar framløgur og kjak verður eisini tónleikur, sum vælumtókti bólkurin Deja Vu fer at standa fyri.

Í Føroyum verður gjørt alt ov lítið fyri at gagnnýta servitan teirra lesandi, og endamálið við lestrarstevnuni er at varpa ljós á og eggja til eitt betrað samstarv millum tey lesandi og vinnuna/ almennu fyrisitingina.

Á hægri lærustovnunum í londunum kring okkumsæst ein gongd, sum vísir, at lesandi í nógv størri mun enn áður velja at fara í starvsvenjing sum lið í hægri útbúgving, og eftirspurningurin eftir klóku heilunum er alsamt vaksandi. Umfram fleiri bæði almenn og privat starvsvenjingarpláss til lesandi hevði eisini verið ynskiligt, at vinnan í nógv størri mun leitaði út til tey lesandi fyri at fáa hesi til eitt nú at gera smáar ella størri kanningar. Hetta kann fyri tann lesandi samantvinnast við uppgávuskriving á lærustovninum.

At eitt betrað samstarv kann vera til gagns fyri báðar partar, man lítil ivi vera um. Tann lesandi hevur ofta feskastu teoretisku servitanina við sær av skúlabeinkinum og kann tískil ofta verða íblástur fyri eina og hvørja fyritøku. Tann lesandi vinnur sær hollar royndir við at kunna umseta bókligu vitanina til praksis.

Luttakarar á lestrarstevnuni verða: MFS, Fróðskaparsetrið, Vinnuhúsið, Løgmansskrivstovan, Fiskimálaráðið (Fiskivinnugransking), Fiskivinnuskúlin umframt tvey lesandi.

Lestrarstevnan hjá MFS er eitt afturvendandi tiltak, sum tekur upp evni, ið eru viðkomandi fyri fólk undir útbúgving, og sum viðkoma hægri lestri sum heild. Tiltakið er alment og byrjar kl. 19.30.

Havnar Bio

kall Coca-Cola




Bøllebob og Smukke Sally

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 19.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |




Hostage

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 19.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |




War of the Worlds

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 19.07 | kl. 19.30 | |
| Mikudag | 20.07 | kl. 19.30 | |
| Hósdag | 21.07 | kl. 19.30 | Seinasta sýning |




Sahara

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 19.07 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 22.15 |

Komandi filmar




Batman Begins FRUMSÝNING

Fríggjadag 22.07




A Lot Like Love FRUMSÝNING

Fríggjadag 22.07

www.bio.fo • Telefon 31 19 56

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu